# Tykkara reinleiki er leiðin aftur á slóðina

**– Tey menningartarnaðu hava nógv at læra okkum,sum tora at kalla okkum normal, segði Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, tá ið hann setti skeiðið fyri menningartarnað, sum nú er í Øravík**

MENNINGARSKEIÐ

*Áki Bertholdsen*

– Tykkara tilvera er sum ein bók, ið vit sonevndu normalu kunnu hava gleði av at kaga í av og á.

Segði Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, tá ið hann seinnapartin sunnudagin setti ráðstevnuna fyri menningartarnað á hotellinum í Øravík.

Hetta er en ráðstevna, sum leiðarar á Serstovnadeildini skipa fyri. Á ráðstevnuni eru 18 menningartarnað og endamálið við tí er at geva teimum betri sjálvsfatan, at læra tey at koma fram við sínum tankum og hugsanum um lívið, at læra tey at seta krøv til samfelagið og til hini og at læra tey at bera síni ynski fram. Hetta er fyrstu ferð, at leiðarar á Serstovnadeildini skipa fyri ráðstevnu sum hesari og tað er Javni, sum hevur latið meginpartin av fíggjarliga stuðlinum.

Høvuðstátturin á ráðstevnuni eru fýra fyrilestrar. Eftir hvønn fyrilestur viðgera skeiðluttakararnir evni í fyrilestrunum í bólkaarbeiði, men stundir eru eisini til útferðir og hugnaløtur.

Sunnudagin helt Hans Esbern Fuglø, leiðari á Verkstaðnum Vón fyrilestur um arbeiði, í gjáramorgunin helt Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini, fyrilestur um bústaðarviðurskifti. Í morgun heldur Julianna N. Foldbo, fyrilestur um sexualitet og í morgin heldur Ragnhild Dahl fyrilestur um frítíðarlív.

Teir norðoyingarnir, sum eru við á ráðstevnuni, komu suður við Smyrli sunnumorgunin og seinnapartin sama dag varð hon sett og hildið verður fram til seinnapartin í morgin.

Tá ið ráðstevnan varð sett, var eisini Finnleif Guttesen, borgarstjóri, boðin við og eisini hann segði nøkur orð at bjóða teimum vælkomnum.



*Á ráðstevnuni í Øravík eru fýra fyrilestrar. Her er tað Hans Esbern Fuglø, sum greiðir frá um menningartarnað og arbeiði*

## Nógv at læra okkum

Páll á Reynatúgvu helt, at eitt slíkt skeið er fyrimyndarlig førleikamenning, tí her hava vit tveir bólkar við ymiskari bakgrund við ymsum møguleikum og við ymsum lívsfortreytum. Hann hugsaði her um skeiðluttakarar og leiðarar.

– Kortini hava hesir báðir bólkar óivað ein heilan hóp at læra av hvørjum øðrum.

– Tit menningartarnaðu hava í øllum førum nógv at læra okkum, sum tora at kalla okkum normal. Í tykkara persónsmensku finnast tey flestu av teimum mest grundleggjandi menniskjavirðunum: Óspiltur næstrakærleiki, treytaleyst sannføri og ótilgjørdur atburður.

– Tykkara heimur og tilvera ein ein bók, sum vit sonevndu normalu kunnu hava gleði av at kaga í av og á, serliga tá ið vit flyta okkum frá teimum kjølfestu manniskjansligu eginleikunum, sum gera eitt menniskja til eitt menniskja.

– Onkusvegna er tykkara reinleiki leiðin aftur á slóðina at minnast til, hvussu lívið eisini kann livast og eigur at livast.

Landsstýrismaðurin segði, at tey, sum hava fingið heitið menningartarnað, eru onkusvegna øðrvísi enn tey flestu.

– Tit skilja tykkum burtur úr tí gráa hópinum. Tit verða ikki longur kallað býttlingar ella evnaveik. Tíbetur. Vónandi er hetta eitt tekin um, at tit so við og við hava fingið tað virðing, ið tit, so væl sum øll onnur menniskju, hava uppiborið.

– Vit mennast jú alla tíðina. Men hjá summum tekur hendan persónliga menningin longri tíð enn hjá øðrum.

– Og tað stendur til okkum sum samfelag og sum myndugleikar at lofta teimum, sum av einhvørjari orsøk eru tarnað í teirra menning, tí uttan neyðuga stuðulin og uttan neyðugu hjálpina, er torført hjá teimum at standa á egnum beinum.

Í hesum sambandi takkaði Páll á Reynatúgvu teimum á Serstovnadeildini fyri tað arbeiði, tey gera, tí tað er eitt arbeiði, sum ger stóran mun hjá teimum, sum ikki sjálvi megna at gera vart við seg

## Nýhugsan, vælvild og tolsemi

Landsstýrismaðurin segði, at eitt gott og innihaldsríkt arbeiði er ein týdningarmikil partur av tilveruni.

– Vit eiga at virka fyri, at arbeiðsmarknaðurin gerst rúmligari og at finna møguleikar so at eisini tey við avmarkaðum førleika kunnu fáa sítt pláss á arbeiðsmarknaðinum.

Hann helt, at hetta letur seg gera, men tað krevur bæði nýhugsan og vælvild og tollyndi frá øllum pørtum.

Tann, sum hevur arbeiði, hevur eisini rætt til virkna frítíð. Eisini á hesum øki eiga vit at finna loysnir, hóast nógv er hent, tí nú síggja vit menningartarnað spæla í hornorkestri, vera við í ítrótti og hava listaframsýningar.

Hann helt, at kynslívið eigur heldur ikki at vera tagdur burtur, tí tað er ein avgerandi og lívsjáttandi partur av tilveruni. Hann segði, at tað skal dirvi til at taka seta orð á hendan partin av lívinum og tí fegnaðist hann um, at eisini hesin spurningurin verður tikin upp.

## Skommin í Smærugøtu

Tak yvir høvdið hava vit øll rætt til og bústaðir til menningartarnað hava vit tosað um leingi.

– Stórur tørvur er á bústaðum til menningartarnað, tó at risastór framstig eru hend seinastu árini.

Men landsstýrismaðurin helt eisini, at tað var skomm, tað, sum var hent í Smærugøtu í Havn, har fólk, ið kalla seg normal, stóðu aftanfyri eina minni dámliga roynd at steðga arbeiðnum at gera sambýli fyri menningartarnað.

– Knappliga vísti normaliteturin eitt av sínum lítið sømiligu andlitum og hetta vísir okkum, hvussu viðkvom og hjálparleys menningartarnað kunnu vera og, hvussu illa útgjørt samfelagið tíverri kann vera at loysa slíkar trupulleikar.

– Og hendan hendingin minnir okkum eisini á, hvussu týdningarmikið tað er, at onkur talar søk teirra menningartarnaðu – ella at onkur tekur stig til at læra tey at tala teirra egnu søk.

Hann vísti á, at endamálið við hesum skeiðnum var at geva menningartarnaðum innlit í teirra rættindi og at læra tey at seta orð á tankar og kenslur og ynski.

– Við hesum førleika kunnu tit sjálvi vera við til at gera vart við tykkum, tá ið vit sokallaðu normalu gloyma, at vit eru ikki tey einastu sum búgva í Føroyum, segði Páll á Reynatúgvu.



*Tá ið landsstýrismaðurin hevði sett ráðstevnuna í Øravík, fekk hann eitt prát við onkrar av luttakarunum*



# Sunnudagsskúlabørn hjálpa gøtubørnum í Kiev

**Teir komandi sunnudagarnar fara børnini, sum ganga í sunnudagsskúla hjá Heimamissióníni, at koma heim við hvør sínari bússu. Hetta er ein liður í eini verkætlan at hjálpa gøtubørnum í Ukreinska høvuðsstaðnum, Kiev**

TÍÐINDASKRIV

Tvey endamál eru við verkætlanini:

1. At sunnudagsskúlabørnini læra at geva av tí, tey eiga.
2. At stuðla arbeiðinum millum gøtubørn í Kiev í Ukreina.

Peningurin, sum kemur inn, fer til arbeiðið, sum Jórun (fyrr Fonsdal, Vestmanna) og Nurlan Malaikev gera millum gøtubørn í Kiev. Tey hava arbeitt í Kiev síðan í februar 2000. Tey byrjaðu við at geva børnunum at eta úti á gøtuni. Seinni lótu tey upp eitt dagskýli, har børnini kunnu koma gerandisdagar. Har fáa børnini ein máltíð, kunnu fara undir brús, hoyra bíbliusøgu og fáa høvi at spæla eins og onnur børn. Framtíðarætlanirnar eru at lata upp eina miðstøð, sum hevur til endamáls at byggja brúgv millum lívið úti á gøtuni og lívið sum ein "vanligur" samfelagsborgari.

Ein av orsøkunum til at Sunnudagsskúlin hjá Heimamisiónini er farin undir hesa verkætlan, er, at tað verður mett at vera av alstórum týdningi, at vit, sum eru so væl fyri matrielt, læra at geva av tí, vit eiga, longu meðan vit eru børn. Tí leggja vit stóran dent á, at foreldrini ikki eru tey, sum lata í bússurnar, men at tey stuðla børnunum í at lata av teirra egna peningi. Ein av hættunum kann vera, at børnini lata nakað av sínum egna lummapeningi, ella at tey savna fløskur og lata peningin í bússuna.

Í samstarvi við Kovan í Sandavági eru gjørdar útvið 2000 bússur. Ætlanin er, at hvørt sunnudagsskúlabarn skal fáa eina bússu, sum tað skal hava standandi heima. Í nøkrum førum verður tað tó soleiðis, at systkin fáa eina felagsbússu.

Umframt bússurnar eru eisini gjørdar plakatir og nakað av kunnandi tilfari um arbeiðið millum gøtubørnini í Kiev, um landið og líknandi. Plakatirnar verða hongdar upp í sunnudagsskúlunum, og síðan er ætlanin, at umleið annan hvønn sunnudag verða sunnudagsskúlabørnini kunnaði um Ukreina og arbeiðið millum gøtubørnini.

Stuðulin til at gera tilfarið, er latin av Mentamálaráðnum umvegis Sp/f Ítróttarvedding.

26. januar 2003 er so ætlanin at savna bússurnar saman aftur, og síðan verður tað, sum kemur inn, sent til Ukreina, so at gøtubørnini kunnu fáa ágóðan av tí.




